## Forsetin er ikki nøgdur

Forsetin í franska fótbóltssambandinum segði við heimligu miðlarnar í gjárkvøldið, at hann ikki var nøgdur við avrikið hjá Fraklandi í móti Føroyum. Ikki minst tí, at fraklendingar ivaðust ov nógv í avgerandi støðunum, helt hann. Somuleiðis vísti hann á, at tíðspunktið er heldur óheppið hjá fraklendingum, tí kappingarnar, har leikararnir spæla dagliga, ikki eru byrjaðar enn. – Næsta mánað verður betri, og tá møta vit Rumenia í einum avgerandi dysti, sum vit kortini ikki óttast, segði Jean-Pierre Escalette, forseti í franska fótbóltssambandium.



## Fegin franskur málskjútti

André Pierre Gignac kundi valla ynskt sær betri byrjan á franska landsliðnum. – Hetta er mín fyrsti dystur og eg gjørdi mítt besta. Eg var konsentreraður allan dystin, og nú kenni eg tað sum, at eg ikki kundi gjørt tað betri enn tað sama, segði matchvinnarin við franskar miðlar í gjár. André Pierre Gignac vísti á, at teir báðir næstu dystirnir hjá Fraklandi vera ógvuliga avgerandi. Hesir eru í móti Rumenia og Serbia.



- Eg eri stoltur av at vera venjari hjá einum liði, sum stríðist so væl, sigur Brian Kerr, landsliðsvenjari

Mynd: Jens Kr. Vang

# Vísa meira frameftir

**Hóast framúr góða úrslitið, var Brian Kerr ikki heilt nøgdur við dystin. – Vit skulu vísa meira, tá vit hava bóltin, staðfesti hann**

LANDSDYSTUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Eg má siga, at eg eri stoltur av at vera venjari hjá einum liði, sum stríðist so væl, sum føryska liðið gjørdi í kvøld. Vit høvdu næstan uppiborið eina betri lagnu við øllum teimum takklingum og avbjóðingum, leikararnir løgdu fyri dagin, sigur Brian Kerr.

Hann heldur kortini ikki, at framgongdin í mun til Serbia dystin hevur verið so eyðsýnd.

- Móti Serbia skaptu vit fleiri vandamiklar møguleikar, tað megnaðu vit ikki móti Fraklandi. Men sjálvandi má tað takast við, at Frakland er eitt betri lið enn Serbia, sigur Brian Kerr.

Tað var framman undan ivasamt, um Franck Ribery fór at byrja inni, tí hann hevur drigist við ein skaða. Dómaraseðilin avdúkaði, at Ribery byrjaði á beinkinum.

- Eg segði við leikararnar, at kom Franck Ribery inn í dystinum, var tað tekin um, at vit stóðu okkum væl. Og so var, sigur Brian Kerr.

### Útskiftingar darvaðu

Longu tá 28 minuttir vóru farnir, gjørdi føroyski landsliðsvenjarin sína fyrstu útskifting.

- Eg visti framman undan, at Holst hevði drigist við ein skaða. Men hansara royndir, skjótleiki og evni, at halda upp á bóltin fekk meg at taka kjansin. Tað gekk tíverri ikki. At Atli Danielsen bleiv skaddur beint fyri hálvleik var so nakað, eg ikki kundi verja meg fyri, men givið er, at hesar báðar útskiftingarnar avmarkaðu okkara møguleikar í seinna hálvleiki at gera broytingar, sigur Brian Kerr.

Hann karakteriserar spælið hjá føroyingum, serliga í verjupartinum, sum organiserað.

- Verjan spældi væl, og Atli Gregersen var krumtappurin, ið alt snaraði um. So hóast spælið sum so einki var at reypa av, tá vit høvdu bóltin, so var tað ein frægd at síggja leikararnar stríðast so fyri sakini. Teir tveittu seg í takklingarnar og góvu alt, teir høvdu, sigur Brian Kerr.

Tað er kortini ikki bert spælið fram eftir vøllinum, hann heldur má gerast betri. Leikararnir mugu eisini gerast fysiskt sterkari.

- Tað vóru fleiri støður, har føroysku leikararnir stutt sagt vórðu kveistraðir til viks, og tað gongur jú ikki, tí teir stóðu í støðunum ikki langt aftan fyri mótleikaran í teknikki. So vit mugu fáa okkara leikarar kropssterkari, sigu Brian Kerr.

Jóan Símun Edmundsson fekk sín debut á A-landsliðnum, og stóð seg sera væl.

- Ja, tað eru evnir í honum. Vit skulu minnast til, at hann leikti móti einum av heimsins bestu miðverjuleikarum, og stóð seg væl, sigur Brian Kerr.

# Undarlig kensla

**- Vit halda taktikkin og megna at halda teimum niðri á 0-1 allan dystin. Men kontramálið kom ongantíð, sigur Jákup Mikkelsen**

LANDSDYSTUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Jákup Mikkelsen, sum nú aftur er aftarsti skansin á føroyska landsliðnum, stóð sum so ofta fyrr ein branddyst. Málið í endanum av fyrra hálvleiki kundi hann einki gera við, men ein fantastisk bjarging móti endanum móti púra fría 1-0 málskjúttanum, André-Pierre Gignac, bjargaði í denn grad dystinum og úrslitinum.

- Hattar vóru bara refleksir, sigur ein lítillátin Jákup Mikkelsen, sum ikki er nøgdur við tapið.

- Tað er sjálvandi eitt fantastiskt úrslit, bert at tapa 0-1 móti Fraklandi, men eg fari langt frá út at feira hetta sum ein hálvan sigur. Til tað skulu stig til, sigur landsliðsmálmaðurin.

Hann heldur, at teir hildu taktikkinum væl. Teir hildu fraklendingum frá fatinum allan dystin, burtursæð frá eina málinum í fyrra hálvleiki, men kontramálið, sum teir høvdu vónað kom, kom ikki.

Men eg vóni, at úrslitið aftur fer at vekja áhuga fyri føroyska landsliðnum í Føroyum. - Eg haldi, at Landskrona stríðsviljin hómaðist aftur, so tað hevði verið gott, um sami áhugin sum tá eisini savnaði seg um landsliðið nú, sigur Jákup Mikkelsen.

Tað var eitt sindur av turbulensi um málmansplássið, tá Heðin Askham stóð á odda fyri landsliðnum í einum dysti í Íslandi í vár, men Jákup Mikkelsen hevur síðani gjørt sína støðu greiða.

- Eg eri við á landsliðnum 100%, í hvussu er hetta árið út. So mugu vit síggja, hvat tá hendir, sigur landsliðsmálmaðurin.




Jákup Mikkelsen stóð klárur, tá boð vóru eftir honum

Mynd: Beinta Haraldsen